## Hermenninir skulu heimaftur

Flestu danir vilja nú hava teir donsku hermenninar heim úr Afghanistan. Í einari nýggjari meiningakanning hjá metroXpress siga 50 prosent av teimum spurdu, at Danmark eigur at taka sínar hermenn úr Afghanistan. 41 prosent halda, teir skuldu halda fram har. Politiski viðmerkjarin Tommy Brems Knudsen heldur, at tað er skeivt av politikarunum at siga, at teir donsku hermenninir eru í Afghanistan fyri at forða fyri yvirgangi í Danmark. Hann heldur, at tað hevði fingið størri undirtøku, um politikararnir søgdu, at hermenninir eru í Afghanistan fyri at skapa frið og demokrati har.



## Havið tekur summarhúsini

Tey seinastu árini hevur Norðsjógvurin tikið alt meiri av vesturjútsku strondini, og í umráðnum við Blåvand og Skallingen norðan fyri Esbjerg er havið so smátt farið at hótta tey ytstu summarhúsini. Í fyrsta umfari hevur tað fingið eigararnar at biðja myndugleikarnar verja strondina betur við eitt nú byrgingum ella verjugørðum. Blåvand og Skallingen eru í Varde kommunu, og umsitingin har sigur, at tað fer at kosta hálva aðru millión krónur um árið at verja summarhúsini. Kommunan sigur, at summarhúseigararnir noyðast at gjalda ein part sjálvir.

# Føroyar ein fjaldur gimsteinur



**- Eg elski Føroyar. Men eg eri helst ikki rætti persónurin til júst tað, tí eg falli altíð fyri øllum londum og fólki, sum eg starvist fyri. Og tess oftari eg vitji, tess meiri elski eg land og fólk. Eg eri lættur at ávirka, men Føroyar tóku veruliga beinini undan mær, tí hetta er veruliga ein gimsteinur. Og her er veruliga talan um eitt land, sum er ein fjaldur gimsteinur, og einasti trupulleikin er, at fólk kenna ikki landið, sigur Simon Anholt, leiðandi serfrøðingur í kappingarsamleika**

KAPPINGARSAMLEIKI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Hóast eftirnavnið er rungandi danskt, hevur Simon Anholt einki við Danmark at gera.

- Nei, tað er púra tilvildarligt. Navnið stavar upprunaligа úr Hollandi. Mama mín er ensk, men pápi kemur úr Norðurhollandi, og navnið stavar haðani, sigur Simon Anholt.

Hann býr í einum býi á eystursíðuni á Onglandi, Norfolk, nærhendis Norwich.

- Tað vil siga, tá eg ikki siti í einum flogfari, tí eg ferðist rættiliga nógv, sigur Simon Anholt.

Spurdur um útbúgving sigur hann, at hon var dýr.

- Eg gekk á fleiri privatskúlum, áðrenn eg fór á Oxford universitetið at ganga, har eg læs fólkalívsfrøði og mál, og tað hevur eitt sindur við tað at gera, sum eg nú fáist við, men kortini ikki so ógvuliga nógv, sigur Simon Anholt.

Og tað sum hann ger nú, er at ráðføra lond viðvíkjandi umdømi og samleika, og tað hevur hann fingist við í 12-13 ár.

Tjóðarbranding og tjóðarsamleiki eru hugtøk, ið verða sett í samband við Simon Anholt, men hann sigur, at tað er ikki hann, sum hevur funnið upp á hesi heiti.

- Tað, sum eg havi nevnt, er tjóðarbrand, og tað er ikki tað sama sum tjóðarbranding. Tjóðarbrand sigur bert, at tjóðir hava eitt umdømi, sum hevur stóran týdning fyri tey. Brand hevur stóran týdning fyri fyritøkur, hava tey eitt gott brand ber alt til, og hava tey eitt ringt brand, klára tær seg ikki. Og tað eg vísti á var, at í hesum døgum við altjóðagerð er tað sama galdandi fyri tjóðir, sigur Simon Anholt.

Hann sigur, at branding merkir, at tú kanst broyta og svika við umdøminum hjá einari tjóð, og tað heldur hann ikki ber til.

- Tú kanst hava eina ávísa ávirkan, men tú kanst ikki broyta veruleikan. Tú kanst ikki branda eitt land á sama hátt, sum tú kanst branda eina øl, til dømis. So eg uppfann vendingina kappingarsamleiki, fyri á rættari hátt at kunna lýsa hugtakið, sigur Simon Anholt.

### Ritstjóri

Hann sigur, at hann við vilja valdi eitt »keðiligt« orð, tí branding er eitt sexut orð og fólk gerast spent um tað og ímynda sær alt møguligt spennandi við ljómandi slagorðum og fangandi lýsingarherferðum.

- Men hetta hevur einki at gera við nakað slíkt. Hetta snýr seg um keðilig ting sum politikk, búskap og samfelagsfrøði. So kappingarsamleiki hóskar væl til hugtakið, og tað heldur fólki frá at hugsa um branding, tí hetta hevur einki við branding at gera, sigur Simon Anholt.

Hann er viðurkendur sum leiðandi serfrøðingurin innan kappingarsamleika og umdømi hjá londum, men hann er lítillátin, tá vit spyrja hann, hvussu hann hevur fingið hetta umdømi.

- Tað kemst helst av, at eg var hin einasti, sum fekst við hetta í mong ár. Eg var hin fyrsti, sum byrjaði at skriva og arbeiða á hesum økinum fyri einum 12 árum síðani, tað er ikki eldri enn so. Síðani havi eg arbeitt nógv og kanna nógv og nógv hevur verið akademiskt arbeiði. Eg byrjaði eina akademiska útgávu, nevnd »Place Branding and Public Diplomacy« og talan er nú um 6. útgávu, sigur Simon Anholt.

Hann er framvegis ritstjóri á blaðnum, og fær tí framhaldandi gott innlit í alt, ið rørir seg á økinum.

- Men meira umráðandi ráðgevi eg stjórnum. Eg eri í føstum starvi í uttanríkistænastuni hjá bretsku stjórnini eini 10% av tíðini, meðan hini 90% av tíðini ráðgevi eg stjórnum um allan heim, sum til dømis Føroyum. Og gjøgnum seinastu 12 árini havi eg ráðgivið einum 54 stjórnum, sigur Simon Anholt.

Men hóast hann hevur úr at gera við sínum starvi sum ráðgevi og at vera ritstjóri á PBPD, hevur hann kortini havt stundir at skriva fleiri bøkur.

- Ja, eg royni at skriva eina bók um árið, og tað eru góðar grundir til at eg geri tað. Fyrst og fremst tí tað stimbrar mín hugsunarhátt og forðar mær í at steðga upp. At skriva eina bók er at líkna saman við at loysa sær buksurnar, tú sleppur tær av við tað, sum tær ikki nýtist meira. Tú skrivar tað í eina bók og so er tað liðugt, tær nýtist ikki at hugsa um tað meira, og tú kanst í staðin menna nýggjar tankar, sigur Simon Anholt.

### Byrjar tað sama endar ymiskt

Tá hann hevur ráðgivið so mongum londum, so eru tað sjálvandi lond á ymiskum menningarstøði.

- Ja, har er talan um alt slag av londum, búskaparliga so breitt, sum tað kann gerast, frá Tansania til USA, og tað er veruliga úr øðrum enda í hin. Geografiskt frá Suðurstillahavinum til Norðuratlantshavið, og í støðd frá Føroyum til nøkur rættiliga stór lond, sigur Simon Anholt.

Men tá londini eru so ymisk, hvussu ber hann seg so at, tá ein stjórn setur seg í samband við hann við ráðgeving fyri eyga.

- Gjøgnum tíðirnar hava eg ment eina arbeiðsskipan, sum er rættiliga líka fyri øll lond. Men úrslitini eru fullkomiliga ymisk frá landi til land, og tað eri eg fegin um, tí tað gevur ábendingar um, at eg ikki eri fallin til vanar. Í summum londum er loysnin strukturell við at seta á stovn stovnar og nevndir, í øðrum londum kann tað vera átøk, tað er ógvuliga ymiskt. Onkunstaðni hevur tað verið ein spurningur um at gera fólk kend fyri tað, sum tey gera, sigur Simon Anholt.

Talan kann eisini verða um at styrkja ein ávísan sektor, so sum ferðavinnu. Tað kann vera so ógvuliga ymiskt, og í summum førum hevur einki verið at gjørt, og hann hevur snøgt sagt rátt teimum til ikki at spilla pening upp á hetta.

- Í Letlandi vildu teir hava meg at branda landið, men eg ráddi teimum til ikki at gera tað, men heldur at savna orkuna um at branda Riga, tí hann hevur nógv betri umdømi enn landið. So alt byrjar á sama hátt, men endar fullkomiliga ymiskt, sigur Simon Anholt.

### Ein gimsteinur

Hann hevur verið í Føroyum einar fimm ferðir seinastu átta mánaðirnar, og honum dámar sera væl landið.

- Eg elski tað. Men eg eri helst ikki rætti persónurin til júst tað, tí eg falli altíð fyri øllum londum og fólki, sum eg starvist fyri. Og tess oftari eg vitji, tess meiri elski eg land og fólk. Eg eri lættur at ávirka, men Føroyar tóku veruliga beinini und-

*»At skriva eina bók er at líkna saman við at loysa sær buksurnar, tú sleppur tær av við tað, sum tær ikki nýtist meira. Tú skrivar tað í eina bók og so er tað liðugt, tær nýtist ikki at hugsa um tað meira, og tú kanst í staðin menna nýggjar tankar«*